# Brúkarin, ið hvarv

JÓGVAN
HORN



Til heystar verður strandfaraskipið Másin 50 ár. Vit, ið reguliga ferðast við hesum skipi, hava í longri tíð vónað at sloppið undan at 'hátíðarhalda' føðingardagin. Gleðin var tískil stór, tá Ritan um páskirnar varð roynd sum alternativ til Másan - at royndin hepnaðist sera væl, birti sanna optimismu um, at nú fór okkurt positivt at henda á farleiðini.

Tess størri er vónbrotið nú, ið tað frættist, at fremsti kandidatur sum avloysari til Másan er ein glastrevjaútróðrarbátur úr Vági.

Báturin hevur verið ein royndartúr á leiðini uttan ferðafólk ella farm, og tekningar av neyðugu umbyggingini til ferðafólkaskip fyriliggja. Tað undrar almikið, at ætlanirnar eru komnar so langt ávegis, uttan at brúkarin á farleiðini er tikin við upp á ráð yvirhøvur. Gamaní hevur manningin á Másanum mett um hendan útróðarbátin, men manningin á Másanum er IKKI brúkarin á leiðini. Brúkarin er svínoyingar, fugloyingar og onnur ferðandi á leiðini - og brúkarin krevur at verða tikin við upp á ráð, fyri at ein nøktandi tørvslýsing kann verða gjørd, áðrenn nøkur avgerð um annað skip verður tikin. Másin er týðilig tala um at skip á hesi farleið verða ikki skift út í heilum. Tá tað endiliga hendir, er avgerandi neyðugt, at man tryggjar sær, at brúkarin fær tað, ið tørvur er á. Annars kann lættliga henda, at talan verður um afturstig, ið fullkomuliga hevði køvt hesa longu niðurpíndu farleið.

Mín áheitan er tískil, at svínoyingar, fugloyingar og ferðandi annars verða eftirspurd!

Annars undrar tað meg stórliga, hvar Klaksvíkar Kommuna og løgtingslimirnir úr Norðoyggjum eru í hesum máli.

# S.O.S. Turbulensur hevur rakt flogfarið, hvat gera vit nú?

HANUS
SAMRÓ
hanus@mess.fo



“Syngjandi fuglur, sum hátt yvir fløtur boðar um summarsins signaðu løtur...” (Poul F. Joensen týddi).

Livst so spyrst, tí summarsins løtur vóru signaðar um ártúsundskiftið av landsins umboðsfólki, og alt føroyafólk skuldi hava møguleika fyri at síggja heimin við egnu eygum. Tignirnar úr Tinganesi lækkaðu skattin til frama fyri hvørjum pengapungi, og bankarnir tóku skjótt undir við hesum sera skemtiliga leiki, tí pengarnir vuksu hóast alt á trøunum, so tað var bara at taka so nógv einum lysti. Vit takkaðu øll gávumildu monnunum fyri blíðskapin og settu okkum væl til rættis í flogfarið.

**Flogtúrurin**
Bæði flogskipari og stýrimaður, saman við vøkru flogternunum, bjóðaðu føroyafólki umborð á skjóttgangandi fuglin. Tað var ikki heilt greitt, í hvørja ætt flúgvarin skuldi flúgva, tí flogskipari og manning kundu ikki semjast um tað, men ferðafólkið skuldi ikki stúra: upp, upp, upp skuldu tey fara. Og flogskiparin helt síni vísdómsorð. Stálfuglurin lyftist spakuliga í dýrdini, og ferðafólkini byrjaðu at kenna á sær, at snútin gekk støðugt uppeftir. Men ferðin var ikki nóg skjót fyri summi av ferðafólkunum, og tey funnu útav, at tað bar til at geara við pengunum, tvs. um ein lánti 100.000. kr. kundi hann geara pengarnar tíggju ferðir. Viðkomandi kundi gerast millióningur frá degi til dags, ella enn betri: hann kundi skriva milliónina á roknskapin hjá fyritøkuni, tí um hann gearaði pengarnar hjá fyritøkuni, kundi hann gerast tíggjutalsmillióningur uppá ein dag! Henda hugburðsbroyting smittaði sum sót gjøgnum luftskipanina, so flogskipari og manning noyddust at seta ferðina upp.

**Cockpit**
Í cockpittinum var semja um, at flogskiparin skuldi flúgva í einari hægri hædd, tí rúsurin sum ferðafólkið fekk, kundi gerast alt avgerandi, um tey valdu somu flogmanning aftur ella ikki. Hvussu tey skuldu røkka hægru hæddina var tó eingin semja um. Flogskiparin hevði eina meining, meðan stýrimenninir og tornið eina aðra. Tó hoyrdist okkurt himprandi ljóð, at flogfarið ikki var egnað til at flúgva hægri uppi, tí trýstið gjørdist ov stórt og órealistiskt, men tað køvdist av málageipanini úr cockpittinum. Flogskiparin gjørdi tað, sum hann var valdur til, og leiðin gekk upp, upp, upp.

**Veðurvánirnar**
Veðrið í høgu hæddini var vakurt, og hugdi ferðafólkið út gjøgnum vindeygað, var eingin endi á bjørtu útlitunum. Gull og bláir gimsteinar vóru at síggja, og varðveitti flogfarið skilaleysu hækkingina, kundi dýrgriparnir gerast privatogn. Men brádliga kom ein harður turbulensur úr Amerika, og vend kom í holuna. Skjóttgangandi snútin byrjaði at ganga niðureftir, og ferðafólkið hugdi bangið at hvørjum øðrum. Hvat var hatta fyri nakað? Yvirnatúrliga atmosferan, sum trúði, at alt læt seg gera, hvarv. Ferðin undan brekku gekk harðliga fyri seg, og summi av ferðafólkunum mistu bæði arbeiði og pengar, tí tey høvdu gloymt veruleikan burtur og lótu seg lokka av gulli og grønum skógum. Men røddin á flogskiparanum hoyrdist úr hátalaranum, og boðini vóru ikki sissandi: motorurin var farin og flogfarið manglaði olju. Manningin var tó vand til slíkar støður, so ferðafólkini skuldu bara taka tað við ró, og røddin hvarv aftur. Ella tað trúði flogskiparin. Mikrofonin var tendrað, og ferðafólkini hoyrdu, hvussu svár støðan veruliga var. “Kreppa, arbeiðsloysi, skerjingar.”

Hvørki flogskipari, stýrimenn ella torn kundu semjast um, hvussu tey skuldu loysa trupulleikan, tí har fanst eingin felags loysn. Manningin hugsaði bara um seg sjálva, og hvat var best fyri seg og sítt ferðafólk. Meiningarnar vóru ymiskar millum alla manningina, og ferðafólkið hoyrdi, hvussu fólkið í cockpittinum bardist fyri tí einstaka. Tískil broyttist hugnaligi hugburðurin, og ferðafólkini byrjaðu at verja einstøku persónarnar, ið høvdu ábyrgd av flogfarinum.

**Ábyrgd**
Men hyggur ferðafólkið út gjøgnum vindeyga, síggja tey, at skínandi gimsteinarnir eru horvnir, og tey gráu og illfýsnu skýggini gapa eftir teimum. Flogmanningin hevur ábyrgdina av, at flogfarið kemur so snikkaleyst gjøgnum turbulensin sum møguligt, og tað merkir, at álitisfólkini draga somu línu. Varðveitir manningin fjølbroytta og ymiska hugburðin, draga teir ikki bara seg sjálvar, men alt ferðafólkið, í dapra og myrka tíðarholið. Tískil áttu teir at lagt alla sína orku - ístaðin fyri at brúka tíðina uppá banalitetir og privatmál - í at rætta róðrið uppaftur. Manningin er vald av føroyafólki, og tískil áttu álitisfólkini at verið nóg búgvin til at handfara álvarsama málið. Men trupulleikin liggur kanska eins nógv á krøvunum, sum verða sett til flogfólkið, tí um tey ikki hava nóg góða útbúgving til at flúgva, eru tey ikki egnaði til tað. Tað er ein erlig sak. Vit mugu tó vísa ábyrgdarfólkunum álit og vóna, at tey megna at broyta støðuna, uttan at tað ávirkar ungdómin. Sama hvat og ikki, neyðloysnir eru aldri hugaligar, og onkur verður altíð noyddur at gjalda fyri sparsomu hondina. Men vit hava tíðina á okkara síðu, og einasta, sum verður kravt av flogmanningini, er at teir taka sær um reiggj og arbeiða saman. Er tað eitt ovurstórt krav? Eitt er tó vist, tað hjálpir ikki at sita hendur í favn og rópa:

- S.O.S. Turbulensur hevur rakt flogfarið, hvat gera vit nú?

# Hvussu við skúladeplinum á Marknagili?

DÁVID
ISFELD
Hósvík



Tað er ikki eiti á prosjektum, ið verða drigin upp úr "gandahattinum", sum politikararnir hava atgongd til (eg sigi "gandahattur", tí eingin veit av nøkrum fyrr enn eitt posjekt knappliga er har - uttan at vera partur av einari "sjónligari" ætlan - men tað er kanska eisini meiningin). Skúladepilin Í Marknagili hevur verið uppi at venda pínliga ofta, men nú er loksins avgerð tikin um, at hann skal byggjast.

5 mió. kr. eru settar av til at rullistarta hetta burturvilsta prosjekt, sum er mett til at kosta uml. 400 mió. kr. Men knappliga kemur tunnilin norður um Fjall upp úr gandahattinum, fær eina pengajáttan at byrja við í ár á nakrar mió. kr., og síðan heilar 70 mió. kr. játtað til næsta ár.

Hvat er játtað til Skúladepilin næsta ár? Ikki ein króna. Vit vita sostatt ikki um Skúladepilin verður lagdur á ís í nøkur ár, um nú kreppan versnar - vit eru von við, at skúlaprosjektið fær nøkur jalig orð á veg niður í frystiboksina. Skúladepilin skal byggjast, tað er játtað, men nær?

**"Gandahatturin"**
Tað síðsta, ið varð drigið upp úr gandahattinum, tað var ein ítróttarhøll til Sandoynna.

"HVAT!?" siga øll - eisini tíðindamaðurin í útvarpinum - hvar kom hatta frá, og hví? Hetta eiga lokalu kommunurnar at gjalda fyri. Hava sandoyingar veruliga einki áræði til at arbeiða fyri hesum? Hvar er B71 í hesum samanhangi? Hava teir ikki ungt fólk og raskar venjarar og leiðarar, til at hjálpa til við hesum? Er tað soleiðis; vit skulu bera okkum at framyvir; skriva biddarabræv (ella hvat nú enn er gjørt) til fíggjarmálaráharran, sum síðani følir eftir, hvat hann kann draga upp úr gandahattinum?

Um landið skal fíggja hesa ítróttarhøll - sum er steinur oman á byrðu eftir tunnilin norður um Fjall - hvussu verður við pengum til skúladepilin? Hvør trygd er fyri, at skúladepilin verður gjørdur innan rímiliga tíð, t.d. stendur liðugur um eini 5 ár? Vit, sum hava áhuga í sømiligum sømdum og lærdóm til ungdóm, eftirlýsa eina framskygta langtíðarætlan við skilagóðum raðfestingum.

Eg veit væl, at raðfesting og langtíðarætlanir eru hugtøk, sum eru at lesa og hoyra allastaðni í løtuni, og gott tað sama, tí tað tykist sum um okkara politikarar eru tunghoyrdir og seintfatandi. Eg meini bara: teir vita, hvussu illa stendur til allastaðni, og teir venda avlíkavæl 90° ella enntá 180° hvørja ferð, teir hava verið vístir á gongda leið av einum samfelagsfrøðingi, búskaparfrøðingi ella øðrum serfrøðingi. Tískil er tað neyðugt at endurtaka hesi týdningarmiklu hugtøk, raðfesting og langtíðarætlanir, ferð aftan á ferð - sum Cato í senatinum í Roma - fyri at fáa hesar tungu politikarar at vísa hesum týdningarmiklu mannagongdum ans.